# … fyri ein skúla



samstarv við Hvalbiar skúla, sum fær 10 undirvísingartímar um vikuna av teirra tímajáttan. Hetta gevur so næmingunum í Sandvíkar skúla tað serliga skúlatilboðið, at teir partvíst hósdag og hvønn fríggjadag ganga í skúla í Hvalba.

- Tað er tí ikki ein fremmandur skúli, flokslærari ella flokkur, sum teir koma í, tá ið næmingarnir í 6. flokki fara til Hvalbiar at ganga í skúla, slær hon fast.

### Netverk

Hvat er so vansin við at hava ein bygdaskúla?, spyrja vit eisini Nitu Næs.

Hon er greið yvir, at um bygdaskúlin verður ov lítil, so er missurin á tí sosiala økinum. Næmingarnir hava ov fá at sparra við, og kann tað í síðsta enda ávirka tað fakliga.

- Sum einalærari er ein til tíðir sera einsamallur, og tí er eitt netverk neyðugt. Eg havi samstarvað nógv við smáu skúlanir kring landið, har vit møtast við næmingum til felags útferðir, og hava stevnu á alnótini, sigur Nita Næs.

Um ein hyggur eftir søguni hjá skúlanum, sum hon er lærari á, so varð hann bygdur í 1890, og varð útbygdur í 90´unum, tí hann var ov lítil til táverandi næmingatal og tørv. Í dag ganga bert tríggir næmingar á skúlanum.

Fyri 100 og 120 árum síðani vóru slíkir spurningar, sum nú eru frammi, als ikki til umrøðu. Bygdaskúlin var eins natúrligur og ein kirkja í bygdini. Samstundis sum vegakervið er ment, er fólkatalið á bygd í støðugari minking, og í Sandvík er støðan tann, at ov fá børn eru í bygdini.

Nita hevur arbeitt bæði á stórum og smáum skúlum, men best dámar henni kortini tann miðalstóra fólkaskúlan, har øll kenna hvønn annan og vita av hvørjum øðrum, og har umleið 14-16 næmingar eru í hvørjum flokki.

- Lat meg tó leggja dent á, at eg einki havi ímóti, at broytingar fara at koma innan fólkaskúlaøki, men eg haldi, at mentamálaráðið skal kalla ein spaka fyri ein spaka, og gera skúlaleiðslum, foreldrum og øðrum púra greitt, hvør námsfrøðiliga hugsanin handan sparingarnar/niðurleggingina av skúlunum eru.

- Eg havi nógv samband við lærarar á øðrum skúlum, og mín fatan er, at hóast stórir skúlar royna at bróta upp úr nýggjum, við nógvum næmingum í hvørjum flokki og fleiri lærarum inni ísenn, so er daglidagurin tó merktur av, at hesar stóru eindir verða býttar upp í smærri eindir. Altso hava vit tann miðalstóra bygdaskúlan umaftur, leggur hon dent á.



*Teir tríggir "aktørarnir" í spurninginum um teir smáu bygdaskúlarnar: Landsstýriskvinnan Helena Dam á Neystabø á vitjan í Sandvíkar skúla, og prátar her við einalærarin, Nitu Næs og tveir av næmingunum, Marý Sigurheim og Rói Spange Larsen*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

## Bygdaskúlin til umrøðu

Í fleiri greinum hevur Sosialurin sett sjóneykuna á støðuna við teimum mongu bygdaskúlunum kring landið.

Vit hava nevnt tað, sum landstýriskvinna, embætismaðurin, borgarstjórarnir og einalærarin halda.

Í øllum førum er ætlanin, at frá skúlaárinum 2011/12 verður skúlaøkið munandi umskipað.

Hevur lesarin hug at gera viðmerkingar til málið, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við Sosialin.

## Halda fast við dygdina og fjølbroytnið

**- Eingin lærari kann vera serfrøðingur á øllum økjum í skúlanum. Tí er umráðandi, at skúlarnir hava eina ávísa støðd, so grundarlag er fyri fjølbroytni og dygd í undirvísingini, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn**

BYGDARSKÚLIN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Fyri Heðin Mortensen er eingin ivi um, at størsti fyrimunurin við skúlasamstarvi, ella við at leggja skúlar saman í størri eindir er, at fakligheitin í skúlunum verður betur tryggjað og førleikarnir hjá lærarum verða betur gagnnýttir.

Hann vísir í eini grein í Skúlablaðnum á, at flestu skúlarnir í Tórshavnar kommunu eru stórir. Tó eru nakrir lítlir skúlar, - á Velbastað eru 49 næmingar, í Kaldbak 29, í Nólsoy 21 og í Koltri eru 2 næmingar.

Tað er eitt ávíst samstarv millum lítlu skúlarnar, og í ávísan mun samstarva teir við teir størru skúlarnar. T.d. hava næmingarnir í 7. árgangi í smáu skúlunum alisfrøði í Hoyvíkar skúla, og næmingar í Kaldbak hava tímar í handverki og list í Kollafirði.

- So broytingarnar fara neyvan at hava so stóra ávirkan á skúlabygnaðin í Tórshavnar kommunu, slær borgarstjórin fast.

### Tillaging

Heðin Mortensen vísir tó á, at tað er umráðandi, at broytingarnar verða skipaðar í góðum samstarvi við kommunurnar. Broytingar skapa altíð órógv, tí er av týdningi, at talan ikki verður um harraboð, men at broytingarnar veruliga verða framdar í samstarvi. Sostatt er rættast at leingja freistina í teimum førum, har semja møguliga ikki fæst.

Viðvíkjandi læraratímum eigur hædd at takast fyri, at í summum førum er ferðasambandið ikki so høgligt, og tí verður neyðugt at varðveita nakrar av teimum smáu skúlunum.

- Tá soleiðis er, eigur tímajáttanin at verða lagað eftir hesum umstøðum, og ikki bert eftir næmingatali í økinum, sum uppskotið gevur fatan av, sigur Heðin Mortensen.

Hann vísir á, at ætlanin hjá landsstýrinum er at varðveita samlaða játtanarkarmin til fólkaskúlaøkið, hóast at ein broyttur skúlabygnaður hevur sparingar við sær. Endamálið er at leysgeva pening til onnur týðandi námsfrøðilig endamál á fólkaskúlaøkinum, eitt nú til næmingar við serligum tørvi, ráðgeving og eftirútbúgving av lærarum.

Ein uppraðfesting av hesum økjum er altavgerandi neyðug, og tí er uppskotið um broyttan skúlabygnað skilagott fyri samlaða námsfrøðiliga arbeiðið í fólkaskúlanum.

- Við teimum fíggjarvánum, ið landskassin hevur fyri framman kann ein óttast, at sparingin verður tikin til at fíggja onnur endamál. Hetta má ikki henda.

- Tað áliggur tí øllum okkum, sum hava ábyrgd fyri føroyska fólkaskúlanum, at styðja undir ætlanina hjá landsstýriskvinnuni, tí soleiðis verður játtanin fleiri næmingum at gagni, leggur Heðin Mortensen dent á.



*- Broytingar skapa altíð órógv, tí er av týdningi, at talan ikki verður um harraboð, men at broytingarnar veruliga verða framdar í samstarvi, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*